# Ormen Lange – ein risi




*Gassið verður fyrst flutt av feltinum til Nyhamna í Noregi og higani víðari gjøgnum rørleiðing til Bretlands*



*Eisini føroyingar eru við at byggja hetta risastóra gassanleggið nær Aukra í Noregi*

**Næsta ár fer tað fyrsta gassið ígjøgnum leiðingarnar úr Ormen Lange-økinum á Haltenbankanum. Fyrireikingarnar hava tá tikið tíggju ár, men verkætlanin er eisini tann størsta og torførasta av sínum slagi.**

**OLJA**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

---

Eftir tí, sum Stavanger Aftenblad hevur fingið at vita, benda tær fyrstu metingarnar á, at 300 milliardir rúmmetrar av gassi eru í Ormen Lange-keldunum. Við dagsins prísi svarar tað til 180 milliardir krónur.

Til sammetingar kann nevnast, at í norska partinum av Frigg-økinum, sum nú hevur framleitt gass í 20 ár, eru 110 milliardir rúmmetrar. Troll-økið er sostatt tað einasta, sum er størri enn Ormen Lange.

*NTB 3. september 1997*

---

Eftir at hava borað í 72 dagar er pallurin Ocean Alliance nú um at vera liðugur á Ormen Lange-økinum, og úrslitið vísir seg at vera sera gott. Pallurin hevur borað á 890 metra dýpi og niður á 3.000 metrar. Royndirnar vísa, at har er nógv gass, men eingin olja.

*NTB 6. oktober 1997*

---

British Petroleum hevur funnið nógv gass á Ormen Lange á Haltenbankanum. Fyribilsmetingar benda á, at talan er um einar 100 til 150 milliardir rúmmetrar. Fyrr hevur Hydro funnið eina stóra gasskeldu á Ormen Lange.

*NTB 27. august 1998*

---

Tað var í 1997, at boripallurin Ocean Alliance fann eina gassleið á Ormen Lange-økinum í einari helling á Haltenbankanum. Kanningar hjá Norsk Hydro, sum stóð fyri boringini, vístu skjótt, at talan var um eina av teimum størstu gassleiðunum á norska landgrunninum. Nakað seinni fann British Petroleum so enn eina gasskeldu á Ormen Lange, og nú var greitt, at leiðin er tann næststørsta í norskum øki. Bara Troll-leiðin hevur meiri gass.

Tær fyrstu kanningarnar vístu, at tað fór at verða ein stór avbjóðing at fáa gassið upp. Eitt var, at dýpið á leiðini er millum 900 og 1.100 metrar, men tey jarðfrøðiligu viðurskiftini undir havbotninum vóru heldur ikki vanlig. Tað vísti seg, at Ormen Lange er á rygginum á einum stórum omanlopi, sum var á havbotninum fyri umleið 8.000 árum síðani, og tí var jarðfrøðin øðrvísi enn tað, sum jarðfrøðingarnir vóru vanir við.

Omanlopið fyri 8.000 árum síðani hendi, tá ein partur av landgrunshellingini við Storegga leyp. Jarðfrøðingar halda, at tað vóru rembingar í jarðløgunum aftan á ta seinastu ístíðina og broytingar í veðurlagnum, sum elvdu til lopið. Benið eftir omanlopið er einar 300 kilometrar breitt, og lopið fór einar 800 kilometrar út í djúphavið. Ormen Lange-brunnurin er einar 1.500 metrar undir havbotninum ella ímillum 2.400 og 2.600 metrar niðan fyri sjóvarmálan.

Undir fyrireikingunum hevur Norsk Hydro sjálvandi kannað, um vandi er fyri, at tað aftur fer at leypa í hellingini. Bæði norskir og altjóða viðurkendir serfrøðingar av ymsum slagi hava verið við í hesum kanningunum, og í 2002 komu teir til ta niðurstøðu, at eftir teirra tykki eru ikki útlit fyri fleiri omanlopum á leiðini.

### 66 mia. krónur

Á heysti í 2003 samdust feløgini, sum høvdu fingið tillutað loyvi á Ormen Lange, um, hvussu leiðin skuldi útbyggjast og gagnnýtast. Feløgini høvdu